## Landssjúkrahúsið
FO-100 Tórshavn

## Maskinmeistari

Søkt verður eftir maskinmeistara til teknisku deild at virka fyri verandi, sum er í farloyvi fram til 1. apríl 2001 at rokna. Møguleikar eru fyri, at starvið kemur at vara longri.

**Arbeiðsuppgávur umfata í høvuðsheitum:** Rakstur og viðlíkahald av tekniskari útgerð og innleggingum. Leiðsla av tekniska starvsfólkinum á maskinverkstaðnum.

Tann ið settur verður í starvið má hava fulla maskinmeistaraútbúgving og helst hava møguleika fyri at fáa góðkenning sum el-innleggjari.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Suna Rasmussen tekniskan leiðara.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Maskinmeist-arafelagið.

Umsókn við viðkomandi upplýsingum og avriti av skjølum verður at senda til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

í seinasta lagi 30. juni 2000.



## Frá Hotel Norð

**Matstovan er nú opin fyri summarið. Eisini er møguleiki fyri gisting, skeið og veitslu.**



Sosialurin - 311820

**Hotel Norð**

FO 750 Viðareiði - Tel. 451244 - Fax 451245



## Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53



## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16





KROSSORÐAGÁTA

**Vinnari: Jóna Jóhannesen**
**Eirargarður 8-101**
**100 Tórshavn**

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: SKREPPUMIKIL

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| S | U | M | M | A | R | M | Á | L | A | D | A | G | U | R | |
| U | S | K | E | D | A | L | | Á | R | A | L | A | G | | F |
| M | A | K | K | A | R | I | N | | N | N | | R | H | U | M |
| M | | | A | M | O | | O | R | E | G | O | N | | N | |
| A | | U | N | S | T | | R | E | | A | L | | A | G | A |
| R | A | N | I | | O | | N | P | K | | S | O | F | F | I |
| S | P | E | K | I | N | G | A | R | K | L | E | P | P | U | R |
| Ó | L | | K | A | G | A | | I | K | O | N | | | G | E |
| L | A | G | U | N | A | S | | S | | O | | P | Ó | L | |
| | N | Æ | R | | | S | T | A | K | K | U | R | | U | V |
| S | A | S | | T | N | | I | | Y | | | Í | D | N | I |
| S | T | A | V | I | N | G | A | R | K | Y | N | S | T | U | R |
| S | Y | | | V | | I | R | A | N | A | R | I | | M | T |
| S | Y | M | B | I | O | S | A | | U | K | | N | A | | U |
| 233 | R | I | O | | V | | N | O | N | | L | | L | E | E |
| A | K | R | A | N | E | S | | K | A | K | A | R | E | L | L |

## Hvønn fríggjadag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. …«** á bjálvan.

234

Loysunarorðið: ……………………………………………

Navn: ……………………………………………

Bústaður: ……………………………………………

Bygd/býur: ……………………………………………

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

**Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:**

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Kalr N. Hansen týddi*

**Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:**

- ❑ **Grønur var dalurin** - *Richard Llewellyn/ Knút Olsen týddi*
- ❑ **Tit bygdu hetta land - Arbeiðsmarknaðurin** - *Jákup Pauli Strøm*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Frumsagnir** - *Neil Philip/Amy Tausen týddi*
- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***



# HYGG & HOYR
Fríggjadagur 16. juni

# Summar á Rás 2

*Summarsending við løtum innsløgum, práti, skemti, heilsum og ynskiløgum mánadag–fríggjadag kl. 13.00*



Rás 2 byrjar summarsendingarnar mánadagin 19. juni

Rás 2 fer at senda eina nýggja summarsending hvønn yrkadag frá kl 13. Seinnapartssendingin, sum vanliga hevur verið millum 16 og 17, fellur burtur, og verður ístaðin partur av nýggju sendingini. Sendingin verður uppbygd við fleiri vertum, ymsum løttum innsløgum, vitjan í útvarpsstovuni og skemti, meðan tað er lurtarin, sum avger, hvør tónleikur verður spældur.

Summarsendingarnar byrja mánadagin tann 19. juni. Føstu skiftisvertirnir verða Sonne Smith, Ó. J. Rólantsson, Ronni Poulsen, Laila Jacobsen, Kristian Joensen og Sunneva Petersen.

Føstu beinleiðis sendingarnar yrkadagar, sum t.d. ferðslusendingin »Breytin« og »KT-Rásin«, verða óbroyttar kl 16 hósdag og fríggjadag, og beinleiðis tónleikasendingarnar »Rekatræið« og »Laila Beinleiðis« verða fluttar til seinni á degnum.

Møguleikarnir hjá Rás 2 við beinleiðis innsløgum ymsastaðni frá eru munandi bøttir í seinastuni, nýtt vælvirkandi studio er komið í gongd í hølunum hjá Norðlýsinum í Klaksvík, eins og Rás 2 hevur fingið nýtt mobilt studio, sum kann senda úr hvørjum króki í landinum.

Á summarskránni eru harumframt fleiri nýggjar sendingar. Nýggj barnasending er á skránni sunnudag kl 16, vertir eru Finn Johannesen og Sámal Eyðfinn Akursmørk. Sunnudag er eisini ein sending á skránni, ið kallast »Bitz«, ein spennandi sending um teldur og teldubrúk við vegleiðingum, vertir eru Allan Poulsen og Steingrím Ósá. Fleiri aðrar ungdóms- og undirhaldssendingar eru á skránni, m.a. við Finni Johannesen, Boga Joensen, Martini Kjærbo og Kristiani Joensen og Ruth Reinert og Súsonnu Klementsen.

EM-Rásin verður eisini á skránni mánadag, týsdag og mikudag til EM-kappingin er liðug. Tað eru Ásbjørn Nattestad og Eyðfinn Steensen, sum leggja til rættis.

Komandi vikuskiftið verður nógv gjørt burturúr Eystanstevnuni í sendingum fríggjadagin og leygardagin, og sent verður beinleiðis úr Runavík sunnukvøld frá kl 21. Leygardagin verður eisini okkurt serligt gjørt burturúr íslendska tjóðardegnum.

# ÚTsjón - um loftmiðlar okkara

# Drotningavitjan og fótbóltur

Marna Jakobsen, exam. art., skrivar

Farna vikan hevur verið merkt av kapping millum drotningina og fótbólt. Fótbólturin hevur verið við yvirlutan, í øllum førum í Sjónvarpi Føroya. Tað leggi eg so einki í, tí eg havi sitið klistrað framman fyri skíggjanum, so ofta tað hevur borið til. Tað tykist sum onnur hava gjørt tað sama, tí samrøðuevnini snúgva seg í løtini at kalla bert um fótbólt.

Útvarp Føroya hevur gjørt eitt sindur meira burtur úr drotningini.Serliga seinnapartin leygardag og um kvøldið vóru reportasjur frá vitjanini. Sjónvarpið hevur mest sum bert kroyst okkurt innslag inn-ímillum fótbóltsdystirnar, ja sjálvt *Dagur og Vika* bleiv til eina hálvleikssending.

Hvítusunnudag sendu bæði útvarp og sjónvarp hátíðargudstænastuna úr Dómkirkjuni í Havn. Tað var stuttligt at síggja prestar, samkomuleiðarar og ja, drotningina til gudstænastu. Áhugavert var eisini at síggja, at har manglaðu onkrir, tað eru teir rætttrúgvandi, sum eru farnir í hernað móti syndini. Tað kundi verið áhugavert, at vita um teir so eisini vilja boykotta drotningina, tí at hon var í kirkjuni.

### Summarið komið
Summarið er komið av álvara. Tað sæst á útvarpsskránni. *Náttaravnarnir* flugu fyri seinastu ferð leygarkvøldið, og *Kvøldarstundin* byrjaði týskvøldið. Jákup Magnussen stílar fyri. Lætt undirhald, viðhvørt lættisoppakent og verturin er eftir mínum tykki í so fjollutur, men lat fara, alt nýtist ikki at vera so álvarsamt.

Sendirøðin *Summarið 2000* fór eisini av barkastokki týsdagin, her er ætlanin at ferðast um í Føroyum og gera sendingar. So sleppa bygdafólk eisini til orðanna, og tað er jú gott, tí mangt hendir úti á bygd, sum hevur almennan áhuga.

### Lurta børnini
At enda eitt sindur um barnasendingar. Øll vita at sjónvarp er ein miðil, sum fangar betur enn útvarp, tað veri seg bæði ung og gomul.

Eg haldi útvarpið ger meira burturúr barnasendingum enn sjónvarpið, tí er tað so harmiligt at vita sær, at tey kanska tosa fyri deyvum oyrum. Eg havi varhugan av at tey sum serliga lurta eftir barnasendingum eru vaksin, tað er sjálvandi gott men ikki nóg gott.

Paula Olsen hevur sagt frá søgum, tann um hvalin, sum vildi hava speigipylsu hevur nógv verið tosað um. Jonna og Katrin senda hoyrispælið *Frændaleysur* og frálíka søgan *Ránið* verður í løtini lisin upp í útvarpinum.

Allarhelst mugu vit vaksnu átaka okkum ein part av skuldini fyri, at børn ikki lurta eftir útvarpi, men útvarpið sjálvt mátti eisini havt áhuga í at vita, um tað er so, at børn ikki lurta eftir teimum. Tað kundi verið gjørt við einari lurtarakanning millum børn. So kundi útvarpið fingið at vita, hvør lurtar eftir teimum, eftir hvørjum og eisini um børn høvdu ávís ynski um evni, ið kundu verið tikin upp í barnaútvarpi. Eg trúgvi eisini at útvarpið, á henda hátt, hevði gjørt vart við seg og sínar sendingar ímillum børn, so hetta gjørdist eitt slag av reklamu fyri barnaútvarpinum.

Hetta var so bert eitt lítið hjartasuff um ein part av fólki okkara, sum bert hevur tað besta uppiborið.

Nú er so bert eftir at bíða eftir samráðingunum á Christiansborg, spennandi verður at frætta hvussu leikur fer.

ÚTsjón — Marna Jakobsen, Steintór Rasmussen, Annika Joensen og Eyðun Joensen skiftast um at skriva ÚTSJÓN